ENDURLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

Við hesum verður søkt eftir verkfrøðingi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.
Viðkomandi skal eisini kunna tola at verða fluttur á aðra deild og fáa aðrar uppgávur, enn tær omanfyri nevndu.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. mars 2005. Merkið brævbjálvan “Verkfrøðingur til vegadeildina”. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Heina Eysturoy, virkandi leiðara av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: he@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


VIÐMERKINGAR

# Marjus Dam er rætt endurgivin

**Edvard Joensen**
*blaðmaður*



Marjus Dam er rætt endurgivin, tá skrivað er, at hann metir Bárð Nielsen at vera politiskan analfabet, um hann ikki skilir, at Sambandflokkurin fær trupulleikar, um landsstýrismaðurin gjøgnumførir ta ætlanina, hann hevur við Toll- og Skattstovu Føroya.

Tað er eisini rætt, endurgivið, tá sagt verður frá Marjusi Dam, at hann metir Bárð Nielsen at gera politiskt sjálvmorð, um hann heldur fast við hasa ætlanina.

Tað er eisini rætt, at Marjus Dam hevur ikki skrivað tað. Tí tað hevur undirritaði eftir samrøðu við Marjus Dam. Men hann hevur sagt tað.

Tað, sum undirritaði hevur skrivað, skal Marjus Dam ikki taka aftur. Men hann má rokna við at verða endurgivin fyri tað, hann sigur við fjølmiðlarnar.

Tað er ikki rætt av Marjusi Dam í Degi og Viku at royna at fáa tað at síggja út, sum hann er skeivt endurgivin.

Tí Marjus Dam veit væl, at hann er rætt endurgivin.


Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagstovustovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtaldeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og dýrt hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




KT-STARV Á HAGSTOVUNI

VIT SÓKNAST EFTIR EINUM VÆL ÚTBÚNUM STARVSFÓLKI TIL KT DEILDINA.

Á Hagstovuni verða flestu hagtalsuppgávur loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum Oracle umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt Oracle menningar- og forritanaramboð, sum SQL, PL/SQL, Warehouse Builder etc. Somuleiðis brúka vit Oracle IAS/PORTAL í samband við heimasíðuna hjá stovninum.

Kunnleiki til eitt ella fleiri av hesum amboðum er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrst og fremst sóknast vit eftir einum dugnaligum fólki, við innliti í datamodell, databasuskipanir og programmering.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða víðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2005.

Set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00 vilt tú hava meira at vita um starvið.

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO



Lesið internet Sosialin !





W W W . S O S I A L U R I N . F O